# Føroyar fara at lukta illa í summar

**Stjórjn í IRF er fullgreiður yvir trupulleikan, men har gerst onki annað, sigur hann**

RUSKINNSAVNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hjá øllum teimum, sum hava føðingardag í summar, er tað kanska eitt gott hugskot at ynskja sær eina klemmu í føðingardagsgávu.

Eina klemmu at seta á nøsina, tí tað er ongin ivi um, at tað fer at lukta illa í Føroyum í summar.

Orsøkin er, at IRF er komið í so stórar trupulleikar, at tað verður neyðugt at leggja brennistøðina á Hagaleiti í Leirvík stilla í eitt tíðarskeið í summar.

Væntandi fer brennistøðin at liggja still í einar 14 dagar.

Samstundis verður heldur onki rusk savnað inn kring landið, hvørki frá húsarhaldum ella av bingjuplásssum.

Orsøkin til, at brennistøðin liggur still, er, at stórar umvælingar skulu gerast á brennistøðina og í hesum sambandi verður ongin ruskinnsavning í tvær vikur í summar frá 12-25 juni.

Eitt nú skal eitt nýtt roykfiltur setast upp, so at brennistøðin kann fáa umhvørvisgóðkenning. Filtrið, sum nú er, tekur bara partiklar, men tað nýggja tekur eisini gass, tungmálm, dioxin o.s.fr. so tað er ein neyðug útbygging.

Samstundis verður rusk, sum skal brennast, heldur ikki heintað á bingjuplássunum frá 8. til 25. juni.

Men tá ið brenningin byrjar aftur, hevur nógv rusk hópað seg upp og tað fer at taka rúm tíð at koma uppundan aftur.

– Vit skulu sostatt ikki vænta, at ruskinnsavningin verður reglulig aftur, fyrrenn í august, í fyrsta lagi, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri á brennistøðini.

Hann sigur kortini, at húsarhaldsrusk fer at vera heintað, sum vanligt, men tað eru bingjuplássini og annað, sum ólag fer at vera á.

## Bíða við at rudda

Nógvar kommunur hava ruddingardag um summarið, men IRF hevur í hesum sambandi eisini heitt á kommunurnar um at bíða við at hava ruddingardag til seinni í ár, ella at avlýsa hann heilt í ár.

Hann sigur, at tað, sum skal gerast við brennistøðina, er, at nýggj roykreinsiskipan skal setast upp. Samstundis skal ein spreingiskaði gerast aftur, sum støðin fekk í vetur og rør í roykrørsketlinum skulu skiftast.

Alt hetta fer at kosta einar 20 milliónir krónur.

Men hví leggja innsavningini av ruski stilla á hásumri, tá ið tað er heitt í veðrinum og ruskið fer at lukta nógv verri enn um veturin, tá ið kalt er.

– Tað er sera einfalt tí, at tað ber ikki til at gera hesar umvælingarnar um veturin. Vit skulu upp í hæddina og tað er ongin møguleiki fyri tað um veturin, tá ið vindur er, sigur stjórin í IRF.

Hann sigur, at hann er fullgreiður um trupulleikan og tann ampa, sum hetta er hjá fólki, men tað er ongin onnur loysn.

– Hetta er ein stórur trupulleiki, men tað slepst ikki undan, sigur hann.




*IRF heitir nú á kommunur um ikki at hava ruddingardag enn og kanska ikki at rudda aftur fyrrenn næsta ár*

# Gøtudalur karmur um handilslív og tænastu




*Tað er á hesum øki norðan fyri tunnilsvegin úr Leirvík, at handilsmiðstøðin skal byggjast*

Mynd: Jens K. Vang

**– Miðjað verður eftir at hava eitt so breitt úrval av handlum sum gjørligt, soleiðis at hesir kunnu "supplera" hvønn annan og draga flest fólk til handilsmiðstøðina, sigur Poul Arne Jacobsen, sum er ein av fyrireikarunum til handilsmiðstøðina í Gøtudali**

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týskvøldið varð avtala undirskrivað á kommunuskrivstovuni í Gøtu millum teir, sum standa aftanfyri ætlaðu handilsmiðstøðina í Gøtudali og Gøtu kommunu. Gøtu bygdaráð hevur frammanundan samtykt avtaluna, sum nú eisini er undirskrivað millum partarnar.

Hetta er eitt avgerandi og stórt stig móti teirri ætlan, sum Gøtu kommuna og stigtakararnir til handilsmiðstøðina hava í Gøtudali, eystan fyri landsvegin í Norðragøtu og norðanfyri tunnilsvegin oman úr Leirvíkartunlinum.

Tað vóru teir báðir, Hans Jørgen Djurhuus og Poul Arne Jacobsen, sum undirskrivaðu vegna stigtakararnar og Páll Isholm, borgarstjóri, vegna Gøtu kommunu.

Gøtu kommuna selir stigtakarunum tilsamans 13.120 fermetrar av lendinum, sum kommunan fer at gera byggibúgvið sum skjótast.

Ætlanin er, at økið verður klárt hjá stigtakarunum at fara inn á um einar 4-5 mánaðir.

Økið norður gjøgnum Gøtudal, eystanfyri landsvegin, er fyri fleiri árum síðan lagt út til vinnuøkið, og Gøtu kommuna hevur leingi átt ein stóran part av hesum lendi.

Páll Isholm segði í gjárkvøldið, at kommunan eigur einar 40.000 fermetrar av lendinum, og at møguleikar eru fyri at veksa vinnuøkið við umleið 40.000 fermetrum aftrat, soleiðis at samlaða økið verður einar 80.000 fermetrar stórt.

Vakstrarmøguleikarnir eru serliga niðaneftir og suðureftir.

## 150 fólk

Poul Arne Jacobsen segði, at teir, sum standa aftanfyri sjálva handilsmiðstøðina, fara at byggja ein bygning í tveimum hæddum, har hvør hæddin verður 2.900 fermetrar – ella 5.800 fermetrar tilsamans. Síðan fara P/F Leif Mohr og P/F Alu-Plast at byggja hvør sína høll upp á 1.240 fermetrar.

Handilsmiðstøðin, sum fer at rúma umleið 10-12 handlum umframt skrivstovum og matstovu undir sama taki, verður bygd syðri á grundøkinum, og síðan verða hallirnar hjá LM og Alu-Plast bygdar norður úr handilsmiðstøðini.

Mett verður, at eini 150 fólk fara at arbeiða í handlum, skrivstovum innan tænastuvinnuna.

## Góð P-viðurskifti

Stórur dentur verður lagdur á parkeringsviðurskiftini, og tilsamans verða 267 parkeringspláss til handilsmiðstøðina og hallirnar hjá LM og Alu-Plast.

– Rættiliga stórur áhugi er fyri at sleppa inn í handilsmiðstøðina, men enn er eingin avgerð tikin um, hvussu samansetingin av handlum og øðrum verður.

Poul Arne segði, at miðjað verður eftir at hava eitt so breitt úrval av handlum sum gjørligt, soleiðis at hesir kunnu "supplera" hvønn annan og draga flest fólk til handilsmiðstøðina.

## Stóran týdning

Páll Isholm, borgarstjóri, segði seg vænta, at handilsmiðstøðin í Gøtudali fer at fáa stóran týdning fyri Gøtu kommunu og økini rundan um kommununa.

– Framtíðin krevur, at handilslívið verður savnað um viðskiftafólkini.

Hann vísti á, at slíkt virksemi eisini setir krøv til kommununa, eitt nú við góðum umstøðum til fólk, ið ynskja at seta búgv, ansingarpláss og frítíðaraktivitetir.

– Undir slíkum umstøðum hevur tað stóran týdning við góðari tilrættalegging, segði Páll Isholm, borgarstjóri.

Tað er Teknistovan í Gøtu, sum hevur teknað handilsmiðstøðina í Gøtudali.

Ætlandi stendur miðstøðin liðug um hálvt annað ár ella so.



*Her verður avtalan um økið til handilsmiðstøðina í Gøtudali undirskrivað, fv.: Hans Jørgen Djurhuus, Poul Arne Jacobsen og Páll Isholm, borgarstjóri*

Mynd: Vilmund Jacobsen